Limur í Siðsemisnevndini:

Anita rakar langt við síðuna av

Anne-Lene Olofson er ein av limunum í Siðsemisnevndini. Hon heldur, tað vera sera løgið, at hon skal verða noydd at verja seg fyri at vera ein av teimum sjey, sum er vald í nevndina. Hon fatar tað, sum er farið fram frá løgtingsins røðarapalli sum, at tað verður lagt eftir sær, tí hon er gift við Peter O.K Olofson

Anne-Lene Olofson heldur ikki, at løgtingskvinnan Anita á Fríðriksmørk helt seg til málið, tá hon frá tingsins røðarapalli legði eftir Anne-Lene ella rættari sagt eftir manni hennara

SIÐSEMISNEVNDIN
Solby A. Eliasen

Klaksvík:
– Tað er heilt týðuligt, at løgtingskvinnan Anita á Fríðriksmørk ikki heldur seg til málið, sum tað veruliga snýr seg um, tá hon úttalar seg soleiðis, sum hon ger. Eg trúgvi ikki, at Bill Justinussen valdi meg í Siðsemisnevndina, tí eg eri gift við Peter O. K. Olofson, sigur Anne Lene, sum bleiv uppringd í summar og spurd um, hon hevði hug at verða í Siðsemisnevndini. Hon ivaðist onga løtu og segði ja beinanvegin.

– Hetta hevur altíð havt mín áhuga, so eg tók av, tí eg haldi, at hetta er avbera spennandi at arbeiða við.

Hon dugir ikki at siggja, at tað sum løgtingskvinnan segði á tingsins røðarapalli kann fatast upp á nakran annan máta enn, at hon eigur at verða vrakað, orsakað av manni sínum.

– Og tað er láturligt, haldi eg. Og av tí sama havi eg ilt við at taka hetta álvarsligt. Men Anita heldur seg slettis ikki til málið, tá hon ger so, tí hon leggur ikki eftir málinum og heldur ikki eftir persóninum, sum hetta umfatar, men manninum hjá tí persóninum, tá hon sigur, at viðkomandi hevur ella er í ferð við at riva seg leysan frá fólkakirkjuni líka sum Dimmalætting sigur í eini oddagrein tann 13.09.02 um mannin hjá mær. Og tí haldi eg, at hetta heldur er eitt mál, sum átti at verðið viðgjørt í javnstøðunevndini, sigur Anne-Lene Olofson speiskt.

Hon er miðnámsskúlalærari við religión og kristnikunnleika sum høvuðslærugreinar og donskum sum hjálærugrein. Hon skrivaði høvuðsritgerð um etikkin hjá Søren Kierkegaard. Hon hevur millum annað undirvíst í etikki á miðnámsskúlanum í sekstan ár, trettan av teimum í Føroyum.

– Eg má gera tað øllum greitt, at hóast tað er sagt fleiri ferðir, at eg eri gudfrøðingur, so eri eg tað ikki. Eg eri útbúgvin sum miðnámsskúlalærari. Og eg veit, at tað eru fleiri, sum halda, at eg eri gudfrøðingur, og at mín "óndi" maður ikki vildi lata meg vera prestur, og tí undirvísi eg í miðnámsskúlanum. Men tað passar also ikki. Tað var mín sannføring, at tað vildi verið skeivt av mær at verðið prestur, langt áðrenn eg hitti Peter, so prestur havi eg ongantíð ætlað mær at verðið.

Anita dumpað

Hon sigur, at eitt, sum hon bandið hjá manninum hjá mær til fólkakirkjuna, sum hon sipar til, sum eg gangi út frá, at hon kennir til frá fjølmiðlunum, hóast hon ikki endurgevur tað rætt, og tað er langt úti, heldur Anne Lene og leggur aftur at, at tað kann ikki vera rætt, at tann ein kvinna er gift við skal vera ein diskvalifikatión til eitt starv ella nevndarsess. Anita sigur óbeinleiðis tað sama, sum verður sagt í oddagreinini hjá Dimmalætting, sum enntá fer so langt at vera við at siga, at hann er í holt við at stovna sína egnu samkomu uttanfyri fólkakirkjuna. Tað ber illa til at skilja úttalilsini hjá Anitu á Fríðriksmørk øðrvísi.

– Hervið er ikki sagt, at eg ikki haldi tað sama sum maður mín, tí tað geri eg í roynd og veru, men hvat hevur tað við málið at gera, spyr Anne Lene, sum undrast stórliga á orðini hjá løgtingskvinnuni.

– Maðurin hjá mær hevur onki við hetta málið at gera.

Hon greiðir frá, at hon í skúlanum ein dagin tosaði við næmingarnar um nøkur hugtøk. Eitt var fakta og eitt var fiktión. Og so er eitt annað hugtak út frá hesum báðum, sum verður kallað faktión. Tað er tillagaður veruleiki. Tað vil siga, at tað er ein søga, har ein við vilja bert tekur tað fram, sum ein sjálvur vil hava, soleiðis at søgan kemur at ljóða sum ein sjálvur vil hava hana at ljóða – ofta til egnan fyrimun. Og hetta samanber Anne-Lene hetta málið við. Tí fólk úttala seg um hana uttan at vita ta veruligu søguna.

– Ein eigur at halda seg langt burtur frá slatri og tillagaðum veruleika – serliga á tingsins røðarapalli, sigur Anne-Lene.

Hon sigur, at hon hugsar ikki so nógv um hetta málið í gerandisdegnum.

– Eg eri helst eitt sindur líkaglað, men tað er eitt, sum eg verði kedd um. Og tað er, at um fylgjurnar av øllum hesum fara at ganga út yvir samstarvið í nevndini. Tað vil siga, at um samstarvið verður vánaligt í millum okkum sjey valdu limirnar. Tí tað tykist sum um, tað verður roynt at seta okkum upp móti hvørjum øðrum longu áðrenn vit eru farin til arbeiðis. Og tað hevði eg verðið sera kedd av, sigur Anne Lene, sum vónar at samstarvið millum limirnar í Siðsemissnevndini fer at verða sakligt og gott við ordiligum argumentum, sum viðkoma teim ymsu málunum, sum tey koma at viðgera.

Í viðmerking til tað, sum Eyðun Andreasen hevur sagt um tey, sigur Anne Lene við einum ironiskum smili, at tað er synd fyri Mentamálaráðið, at tey skula hava sett "tílíkar idiotar, sum høvdu argumenterað fyri, at jørðin er fløt" í starv.

Anne-Lene Olofson er hørm um, at fýra av limunum í Siðsemisnevndini verða hongd út á ein tílíkan hátt.

– Eg kenni ongan av hinum limunum persónliga. Eg havi sað ein teirra í sjónvarpinum einaferð, men annars haldi eg ikki, at eg havi hitt nakran av teimum. Í øllum førum ikki, sum eg minnist, sigur Anne Lene Olofson og leggur at enda enn einaferð dent á, at hon vónar ikki, at alt hetta fer at ganga út yvir samstarvið í Siðsemisnevndini.

Erik Olsen í Smiðjuni

LISTAFRAMSÝNING
Tíðindaskriv

Hósdagin letur útlagni ritu-víkingurin Erik Olsen upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík við prýðislutum og brúkslist úr kopari, stáli, granitti og øðrum tilfari.

Erik Olsen, sum er føddur í Rituvík í 1931, hevur síðani 1956 fyri tað mesta búð í Íslandi og Danmark - síðstu fimtan árini í Esbjerg.

Seinnu árini hevur hann javnan vitjað heimaftur á klettarnar at sýna fram nakað av tí, hann tekst við, nú hann við hondunum styttir sær stundir við list, ið eins væl er handverk.

– Markið millum handverk og list er kanska ikki altíð so stórt, og eftir eitt langt lív við handverki, var ikki so langt hjá mær at fara til listina eisini, sigur Erik Olsen, sum sýnir fram einar hálvthundrað lutir, sum eru ymiskligir í bæði skapi og vavi.

– Longu á ungum árum fekk eg áhuga fyri tí, ið kundi gerast við hondunum, og nú eg fyri aldur ikki longur eri tøkur á arbeiðsmarknaðinum, syrgi eg á henda hátt fyri, at eg ongantíð siti fyri einki.

Mong ár var Erik í starvi sum faklærdur bilbyggjari í Íslandi, so tí er tað hesi síðstu næstan tjúgu árini fallið honum náttúrligt burturav at gera lutir úr komprimeraðum stáli, kopari og granitti.

Nógvar framsýningar

Listaverkini, ið verða sýnd fram undir merkinum »Erik Olsen Design« fevna um alt frá fleiri røðum av ljósastakum og skálum til borð, stólar og spegl, umframt aðrar størri og smærri lutir.

Síðani hann fyri einum ári síðani hevði framsýning í Føroyum, hava boð verið eftir honum til fleiri framsýningar í Danmark, so hóast eftirløntur hevur Erik Olsen úr at gera í garasjuni heima við hús, har hann brúkar allar leysar løtur til sína list.

Framsýningin hesa ferð minnir nógv um framsýningina fyri einum ári síðani, men alt er tó nýtt tilfar, ið er at síggja í Smiðjuni í Lítluvík í knappar tvær vikur.

Hans Tausen Olsen, sum eisini er ættaður úr Rituvík, fer at seta framsýningina hjá Erik Olsen hósdagin 19. september kl. 17, og síðani verður hon opin hvønn dag frá kl. 14 til 20 líka til týsdagin 1. oktober.

PrimaVera selir pizza á Kambsdali

Gongst sum ætlað, fer matstovan eisini at borðreiða við ymiskum sløgum av búffum í næstum.

MATSTOVUR
Vilmund Jacobsen

Fyrst í hesum árinum læt Dagunn Nolsøe Larsen upp matstovuna, PrimaVera, í ítróttarhøllini á Kambsdali. Orðið "matstova" er kanska ikki dekkandi fyri virksemið hjá Dagunn, tí PrimaVera ger og selir í fyrsta lagi pizza. Til ber eisini at bíleggja smyrjibreyð, bæði inni í matstovuni og koyrt til dyrnar, men hetta má verða í hampiligari tíð frammanundan. Umframt at selja pizza, selir matstovan eisini chips, sodavatn og sigarettir.

Opið hvønn dag

Sosialurin vitjaði PrimaVera herfyri og varð móttikin av Dagunn, sum er útbúgvin køkshjálpari og hjálparmanni hennara, 20 ára gamla Mortani Nónsgjógv. Aftrat sær til hjálpar, tá ið nógv er at gera, hava tey sonin hjá Dagunn, 23 ára gamla, Birgar Larsen.

Tá ið matstovan í ítróttarhøllini læt upp síðst í januar, hevði einki virksemi verið har seinastu árini. Matstovan hevur tískil verið stongd og fólk, sum vitja í høllini og annars vildu keypt sær okkurt etandi og drekkandi á Kambsdali, hava ikki havt hetta høvi síðan seinnapartin í nítiárunum.

PrimaVera hevur opið hvønn dag millum 17 og 23, og vanligar gerandisdagar er eisini opið millum kl. 11 og 14, tó ikki leygardag.

Dagunn leigar matstovuna frá hallarnevndini, sum umsitir ítróttarhøllina, ið Fuglafjarða kommuna, Gøtu kommuna og Leirvíkar kommuna eiga í felag.

Pepperoni special

Tá ið Sosialurin vitjaði, hevði Mortan gjørt okkum eina pizza, sum kallast "pepperoni special" og aftrat tí vanliga, hevði hann lagt ananas og tað, hann kallaði jalabeno pipar", omaná.

Pizza'in gagnaðist ógvuliga væl, og meðan vit ótu, prátaðu vit eitt nú um tað at gera eina pizza.

PrimaVera hevur fleiri sløg av pizza, og Dagunn og Mortan, sum bæði gera pizza, arbeiða støðugt við at hava eitt uppaftur størri úrval.

Spurdur, um tað er leingi at læra at gera pizza, sigur Mortan, at tað heldur hann ikki.

– Ert tú nærlagdur, tekur tað einar 3-4 dagar at seta seg inn í hetta arbeiði, sigur hann.

Á PrimaVera verður pizzabreyðið gjørt við eini maskinu.

– Hetta ger, at okkara pizza hava lítið feitt, minni enn vanligt. Skalt tú evna breyðið ella botnin til við hond, er neyðugt at brúka meira feitt, og tað vilja vit ikki hava, sigur Dagunn.

Hon vísir annars á, at tey gera meginpartin av tilfarinum burtur úr rávøru, sum tey evna og skera til sjálvi.

– Vit elta deiggið og gera breyðið. Oksakjøtið verður gjørt til burtur úr rávøruni, og vit skera piparfruktir, leyk og annað til sjálvi. Einasta, ið kemur sum konserves, er ananas, champignon og mais, sigur matstovueigarin.

Búffar

Gongst sum ætlað, fara tey á PrimaVera í næstum at gera og selja búffar, og her verður ætlandi talan um fleiri sløg av búffum.

Dagunn sigur, at hon so við og við hevur bygt matstovuna upp, og í hesum arbeiði er hon sera fegin um leiklutin og stuðulin hjá starvsfelagnum, Mortani, sum er ein ógvuliga skilagóður og nærlagdur drongur.

– Tá ið vit lótu upp síðsta vetur, var innandura ítrótturin ikki liðugur, og tí var nógv at gera ta fyrstu tíðina. Síðan var virksemið eitt sindur slakari, men nú er líkt til, at fleiri og fleiri aftur vitja PrimaVera. Vit bíða nú eisini spent eftir, hvussu heystið og komandi vetur verður, sigur matstovueigarin, Dagunn Nolsøe Larsen.

Mortan Nónsgjógv hevur júst tikið eina "pepperoni special" úr ovninum.
– Tað tekur ikki so langa tíð at læra seg at gera pizza, sigur hann.
Mynd: Vilmund Jacobsen

Nýggjur handil við stórum úrvali av filmum

Bogi Olsen, sum leygardagin læt upp nýggjan handil við filmum til útleiging, hevur størsta úrval av sínum slagi á Skálafjørðinum.

HANDIL
Vilmund Jacobsen

Tey, sum leiga videofilmar og fløgur út í Eysturoy, hava nú fingið ein nýggjan kappingarneyta.

Síðsta leygardag læt snotuligi handilin við tí geniala navninum, C-it, upp í gamla Oyrahandlinum á Toftum. Eigari av handlinum er 28 ára gamli saltnesmaðurin, Bogi Olsen, ið annars arbeiðir sum sølumaður.

Hann leigar hølini frá Sigurdi Højgaard á Toftum og versoninum, Jan Mohr í Fuglafirði.

Bogi hevur sjálvur og við hjálp frá pápa sínum, Karl, ið er timburmaður, innrættað sær hølini og sett tey í stand.

Stórt úrval

Spenningurin var stórur hendan dagin, handilin skuldi lata upp kl. 17, og ein hópur av fólki stukku inn á gólvið.

Bogi sigur, at úrvalið av filmum er stórt, og her eru bæði vanligir video-filmar og DVD-filmar, ið eru filmar á fløgu.

Hvussu stórt úrvalið er, vil hann ikki siga ítøkiliga, men vit skilja, at hetta er størsta úrval av videofilmur og fløgum á Skálafjørðinum.

– Vit hava filmar til allar aldursbólkar, bæði spenningsfilmar, dramafilmar, stuttleikafilmar og barnafilmar, sigur Bogi.

Hann vísir á, at C-it fer at fáa nýggjar filmar heim hvørja viku, og tí verður tað altíð áhugavert at vitja handilin, um tú ætlar tær at leiga ein góðan film.

Kioskvørur

– Enn er handilin so nýggjur, men eg haldi, eg havi rakt seymin á høvdið. Fyrstu dagarnir hava víst, at tørvur er á einum handli, sum hevur eitt stórt og fjølbroytt úrval av videofilmum, sigur Bogi Olsen.

Umframt útleiging av filmum, selir C-it eisini ymisk sløg av chipsi og poppkorni, nakað av góðgæti og sodavatn, ið vanliga verða nýtt til filmshugna.

C-it er opin frá sunnudegi til hósdag frá kl. 17-23 og fríggjadag og leygardag frá kl. 17-23.30.

Meðan Sosialurin vitjaði C-it mánakvøldið, var hendan nesdiddan inni á gólvinum og leigaði sær ein film.
Mynd: Vilmund Jacobsen

C-it er nýggjur og snotuligur handil á Toftum, ið leigar út video-filmar og DVD-fløgur við filmum.
Mynd: Vilmund Jacobsen